## Læknatrot

Í syðra parti av Danmark fáa tey ein trupulleika tey næstu árini, tí tað vísir seg, at ein triðingur av øllum læknunum í økinum fara frá fyri aldur innan fyri tey næstu fimm árini. Samstundis er tað ein sannroynd, at tað eru ikki nógvir ungir læknar, sum bíða eftir at fáa størvini, sum verða leys, skrivar JydskeVestkysten. Felagið hjá læknunum í syðra parti av Danmark sigur, at um fá ár verða tað fleiri býir, sum als ongan lækna hava.

## Høll nógv dýrkað

Tá kommunurnar í Sandoynni samdust um at byggja eina ítróttarhøll við Meginskúlan á Sandi, skuldi høllin kosta 12 mió. krónur. Seinni bleiv kostnaðurin 19 mió. krónur, men nú er kostnaðurin kom upp í 28 mió. krónur. Upprunaliga játtaði landið at rinda 45 prosent av 12 mió. krónum, men nú er ætlanin at fáa landið at rinda 45 prosent av 28 mió. krónum. Tað er rímiligt, sigur Gerhard Lognberg, skúlastýrisformaður, við Dimmalætting.





*Bert tveir snellubátar loystu á Eiði í gjár. Annar var Langanes av Strondum (mynd), sum var aftur at landi nakað út á seinnapartin, tá hann lotaði so fríska vestaneftir. Ein maður var við bátinum, og hann hevði fingið eini 200 pund í eina løtu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Teir reka útróður úr Nólsoy

**Tríggir bátar reka útróður úr Nólsoy burtur av. Hetta gevur nógv arbeiði við umreking, tá útróður er. Vit hava skift orð við ein av útróðrarmonnunum, Kristin Hansen, ið rekur útróðrarbátin, Krista Maria**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit høvdu sløk 5.000 pund í fyrradagin. Alt var gráur fiskur, og vit seldu fyri einar 38.000 krónur. Hetta var ein rímiliga góður línudagur hjá okkum. Vit vóru vestanfyri, nú Vágahavið just er latið uppaftur fyri línuveiði. Vit vóru so sunnarliga á og sóu ikki nógvar bátar. Teir siga, at rættiliga nógvur bátur var vestari á hendan dagin.

Tað sigur Kristin Hansen, sum rekur tann eina av trimum útróðrarbátum, sum burtur av rógva út og rekja línuna í Nólsoy.

Báturin, sum Kristin og tveir aðrir mans rógva út við, er 46 fót stóra Krista Maria, sum er ein av teimum nýggjaru kanadisku útróðrarbátunum, ið hava last. Í lastini rúmast eini 8.000 pund, men dekkið er velduga stórt.

Navnið Krista Maria er eftir næst elsta barninum hjá Meinhardi Jacobsen, stjóra á Faroe Seafood, ið er versonur Kristin. Meinhard er giftur Fríðunn, ið er dóttir Kristin og Marjun.

### Vánalig prísútlit

- Vit kundu verið farnir útaftur í dag, men hildu ikki, at líkindi eru til nakran serligan fiskaprís so tætt uppundir páskahøgtíðina, tá meginparturin av flotanum kemur til lands. Vit hava eisini skilt, at línubátar eru farnir til Skotlands við fiskinum, tí teir ikki vóru nøgdir við prísin, teir kundu fáa her heima. Aftrat hesum, er streymurin hálvharður í løtuni.



*- Allir bátarnir í Nólsoy seta við trakt, og tí verður línan rikin um, og húkarnir settir á stokkar. Hetta riggar væl, men eg trúgvi, at teir, sum egna við hond, hava munin í fiskiskapi. Agnið hjá teimum kemur betri á húkin, heldur Kristin Hansen, sum rekur útróðrarbátin, Kristu Mariu*

*Mynd: Leo Poulsen*



*Brøðurnir, Rúni (mynd) og Bárður Poulsen, reka útróðrarbátin Tóru. Aftanfyri Rúna á myndini sæst Marnar á Skúr, sum rekur um fyri útróðrarbátarnar í Nólsoy*

*Mynd: Leo Poulsen*

Umframt Kristu Mariu, rógva eisini tveir aðrir bátar út úr Nólsoy. Teir eru Tóra hjá brøðrunum, Rúna og Bárði Poulsen og Trý Systkin hjá Eyðbjørn Danielsen.

- Allir bátarnir seta við trakt, og tí verður línan rikin um, og húkarnir settir á stokkar. Hetta riggar væl, men eg trúgvi, at teir, sum egna við hond, hava munin í fiskiskapi. Agnið hjá teimum kemur betri á húkin. Hinvegin gevur traktin tann fyrimun, at tú ongantíð fert við gomlum agni – heldur ikki eftir, at uppiløgur hava verið, og línan tá annars hevði staðið egnd og fryst.

Kristin vísir eisini á, at tað er nógv skjótari at rekja línuna um enn at egna hana, og hann heldur, at tað rættiliga hevði staðið á hjá bátunum at fingið alla línuna egnda, um bátarnir ikki settu gjøgnum trakt, sum teir gera í dag.

- Er útróður dag um dag, stendur á at fáa alla línuna riknað um, sigur hann.

### Nógv umreking

Krista Maria hevur ikki fastan landformann, men Hjørleif Jacobsen hevur verið óførur at egnt og skipað fyri í skúrinum hjá teimum.

Jona Hansen, systir Eyðbjørn, hevur verið landformaður hjá Trý Systkin í fleiri ár, og hon er ógvuliga røsk. Í skúrinum hjá henni rekja ofta fleiri konufólk um, og summar dagar er skúrurin at kalla bara mannaður við konufólki.

- Vit egna høgguslokk, sauri og gággu, sum vit veiða sjálvir fram við landi, úr Tjørnunesi og norður á Boða. Eg vænti, at umleið ein triðingurin í miðal av agninum, vit egna, er gágga. Hava vit meira gággu, egna vit eisini meira av henni, men er útróður dag um dag, kann vera torført at fáa hendur á nógvari gággu til seturnar.

Útróðrarmaðurin sigur, at væl av gággu fæst fram við landi, tá streymloysa er, men rekur ov hart, fæst lítið og einki.

### Besta agnið

Men hvat er so besta agnið?

- Tað veldst um, hvar línan verður sett. Verður sett á bleytum botni, er gággan eingin fyrimunur, men verður sett eftir toski, fiskar hon nógv betri hesa tíðina av árinum.

Kristin Hansen sigur, at januar og februar í ár royndust hampiliga væl, men mars hevur roynst vánaligur – í fyrsta lagi tí, at tað viðraði so illa.

- Eg vil siga, at vit funnu ongantíð rætta "stevið" í mars. Vit royndu ymsastaðni, men fingu sum heild ov lítið burtur úr, sigur útróðrarmaðurin.

Teir tríggir útróðrarbátarnir í Nólsoy leggja veiðina upp á Toftum og selja um uppboðsøluna hjá Fiskamarknaði Føroya.